Jólaborðhald, arbeiði og jólafrí:

Fýra skip landa á Sandi hesa vikuna

– Heldur veðrið sær, vænta vit eisini nógvan útróðrarfisk, sigur Jóan Petur Vest

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Sandoy: Á Sandoy Seafood høvdu tey longu mánadagin tryggjað sær neyðugu ráfiskanøgdirnar til hesa vikuna undan jólahøgtíðini.

Aftan á hugnaliga jólaborðhaldið hjá Sandoy Seafood í Skopun leygarkvøldið við góðum mati, undirhaldi og dansi, verður neyðugt hjá arbeiðsfólkinum at taka nøkur tøk aftrat hesa vikuna, áðrenn farið verður í jólafrí

Váðasteinur góðan túr

Jóan Petur Vest visti longu mánamorgunin at siga, at tað verða fýra landingar til Sandoy Seafood hesa vikuna.

– Vit fara tí ikki at keypa fisk á gólvinum hesa vikuna, men tað, sum kemur aftrat, verður útróðrarfiskur, um góða veðurlagið heldur fram. Mánamorgunin var línuskipið, Váðasteinur á Sandi. Teir høvdu 140.000 pund av toski og hýsu. Sum skilst, hava teir roynt undir Føroyum, og hetta er ein góður túrur hjá einum línuskipi.

Í dag, týsdagin, kemur Eysturbúgvin. Teir hava verið úti fullan túr, men mánamorgunin visti Jóan Petur ikki, hvussu nógv teir høvdu inni. Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, sum samtrola, plaga at fiska væl, so helst hava teir eina hampiliga last, nú teir landa seinastu ferð undan jólum.

Vesturbúgin landar ikki á Sandi hesaferð.

Jóan Petur væntar eisini, at snelluskipini, Morning Star og Báran, landa á Sandi í dag. Tey hava upsa, men greitt var ikki mánamorgunin, hvussu nógv tey høvdu inni.

Nógvur útróðrarfiskur

– Saman við tí útróðrarfiski, sum kemur upp á land í Sandoynni um dagarnar, er hetta nóg mikið av ráfiski til alla hesa vikuna, sigur Jóan Petur.

Hann vísir á, at mánadagin lá nakað av fiski niðurfyri frá síðstu viku, og haraftrat hava útróðrarbátarnir fingið væl.

– Hesar dagarnar, veðrið hevur verið so gott, hava vit keypt eini 40.000-60.000 pund av útróðrarfiski um dagin, bæði á Sandi og í Skopun. Bátatalið í báðum bygdunum er á leið tað sama. Teir flestu royna við snellu, nakrir við línu. Bátarnir við snellu hava ligið uppí 1300 pund um dagin. Í flestu førum er bara ein maður á hvørjum báti, sigur Jóan Petur.

Jóladøgurði í Skopun

Flestu arbeiðspláss fara út at eta ein jóladøgurða, tá ið desember er farin at halla. Hetta er vorðin siður víða um í landinum. Har arbeiðsplássini eru smá, er vanligt, at fleiri taka seg saman ella leita upp stað, har skipað verður fyri felagsjólaborði, t.d. á hotellunum.

Alt arbeiðsfólkið á Sandoy Seafood var soleiðis til jólaborðhald í bygdahúsinum í Skopun leygarkvøldið.

– Hetta var sera hugnaligt. Vit fingu góðan mat, høvdu undirhald, og síðan var dansur, sigur Jóan Petur Vest.

Einki er at ivast í, at tað hevur týdning fyri trivnaðin á einum arbeiðsplássi – og ikki minst, tá ið talan er um tvey virkir, at fólk kunnu samlast til hugna og gaman einaferð um árið.

Fiskavirking í Havn:

Tekur týðandi tøk í menningini av okkara fiskaframleiðslu

Fiskavirking í Havn er eitt rættiliga áhugavert og fleksibult virki, sum tekur stór tøk til tess at menna føroyska fiskaframleiðslu. Umframt at meirvirka frystan russaratosk, keypir virkið eisini fløk frá øðrum føroyskum virkjum, sum verða meirvirkað og útflutt sum eitt nú portiónir og panerað fløk

Vilmund Jacobsen

Fiskivinna kann viðhvørt tykjast at vera eitt løgið fyribrigdi, men oftast finst ein ella onnur frágreiðing til tað, sum gjørt verður – ella tað, sum ikki verður gjørt.

Í Klaksvík landar Sjúrðarberg frystan tosk úr Barentshavinum. Hesin verður frystur á Kósini. Á virkinum siga tey, at hetta er kvalitetsfiskur, men kortini endar fiskurin helst í Noregi.

Í Havn hevur Føroya Fiskavirking eitt virki, gamla Bacalao. Av rá-fiskinum, tey keypa, er eini 80% frystur russaratoskur, og tað má sigast at vera ógvuliga »flott«. Áður keypti virkið eini 10.000-12.000 tons av fiski undan Føroyum, og tað hevði merkt eitt ella annað, um virkið gjørdi tað sama í dag; tá hevði verið minni til onkran annan, og kappingin um fiskin hevði helst verið uppaftur størri. Hetta hevði so aftur fført við sær, at fiskaprísirnir vóru hægri, enn teir longu eru. Um hetta hevði verið gott ella minni gott, skulu vit ikki meta um á hesum sinni.

Eitt »fleksibult« virki

Tað skerst ikki burtur, at Fiskavirking í Havn er eitt rættiliga áhugavert og fleksibult virki, sum tekur stór tøk til tess at menna føroyska fiskaframleiðslu. Tí, umframt at meirvirka frysta russarafiskin, keypir virkið eisini fløk frá øðrum føroyskum virkjum og selir tey avstað aftur sum lidna vøru.

Jan Øregaard, sum leiðir virkið í Havn, sigur, at meginparturin av russarafiskinum kemur higar við skipum, oftast frystifarmaskipum, sum eru uppi í Barentshavinum eftir fiskinum. Á opnum havi verður fiskurin skipaður umborð á farmaskip, sum føra hann hendanvegin. Soleiðis hava russar altið gjørt. Í øðrum førum koma trolararnir sjálvir á Havnina.

– Tað er sjáldan, vit síggja nakra ísfiskalanding í Havn, men hetta er nakað, vit arbeiða við, sigur virkisleiðarin.

Spurdur, hví tey í Havn arbeiða frystan tosk, tá ið nógvur ísfiskur annars kemur uppá land, sigur Jan:

– Vit fóru undir hesa verkætlan í sínari tíð, og vit hava roynt at hildið okkum til hana, síðan vit byrjaðu. Tað hevur ongantíð verið nøkur stór forrætning at arbeiða frystan fisk, men Føroya Fiskavirking, sum er eitt stórt felag við nógvum virkjum, hevur hildið tað verið skilagott, at virkið í Havn arbeðir á henda hátt.

Góðskingarvirki

Hann vísir á, at ætlandi skuldi virkið arbeiða eini 6.000 tons av ráfiski um árið, men nøgdin liggur rundan um 5.000 tons.

– Vit arbeiða sum flest øll onnur virki. Russarafiskurin verður seldur sum flak og nógv verður selt sum portiónir.

Jan sigur, at virkið í Havn er eisini eitt góðskingarvirki, sum bæði meirvirkar egna rávøru og fløk, sum teir keypa frá øðrum føroyskum virkjum – eisini øðrum virkjum enn teimum, sum eru undir »hattinum« hjá Føroya Fiskavirking. Her er talan mest um upsa, sum eitt nú verður keyptur í kørum og virkaður til upsaportiónir. Tey panera eisini fløk og selja tey av landinum.

– Dýrasta vøran, vit framleiða, kallast wethpack. Her verða 4 fiskabitar, sum viga 100 gr. hvør, koyrdir í plastiklummar. Tað eru bara vit, sum framleiða hesa vøruna, ið verður seld til Fraklands, Belgiu og Sveits. Wethpack verður virkað bæði úr frystum russarafiski og føroyskum fiski. Tá ið vøran verður seld, gjalda vit toll av russarafiskinum, men ikki tí føroyska.

Meginparturin fer til Evropu, men tann parturin, sum fer til USA, verður ikki álagdur tollin.

Turri fiskurin er nógv eftirspurdur

Á Fiskavirking í Havn hava tey eisini tað, tey kalla ein pakkisentral, og tað er her, meirvirkaða vøran verður pakkað. Ætlanin er at útbyggja sentralin uppaftur meira.

Virkið hjá Fiskavirking í Havn er eitt rættiliga stórt arbeiðspláss; har arbeiða 130-140 fólk, harav eini 20-30 á góðskingarvirkinum og á pakkisentralinum.

Jan vísir annars á, at rættiliga stórur eftirspurningur er eftir tí turra Lundafiskinum.

– Tað vísir seg serliga undan ólavsøkuni og jólum, at eftirspurningurin eftir hesum fiski er stórur. Men rávøran, sum í hesum førinum skal vera tann besta, er dýr, og úrtøkan er lítil, eini 10-12% av ráfiskinum. Tí verður fiskurin eisini dýrur hjá fólki at keypa.

Jan Øregaard sigur at enda, at tey turka eini 6 tons av toskaflaki hvørja ferð.

Leggjast kann aftrat, at á Fiskavirking í Havn verður ein stórur starvsdagur til várs; tá hevur ein maður – er hann nevndur, so er hann kendur (!), starvast á virkinum í samfull 40 ár.

UTTAN ÚR HEIMI

Bin Laden horvin

Bæði Colin Powell, uttanríkisráðharri og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri noyddust sunnudagin at viðganga, at amerikanarar vita ikki, hvar Osama bin Laden er

Mynd: Reuter

Sum væntað var Osama bin Laden ikki at finna í Tora Bora

ÚTLAND
Fartekst

Hóast amerikanska herleiðslan líka til tað síðsta helt uppá, at Osama bin Laden fjaldi seg í holunum við Tora Bora, var hann ikki at finna har, tá hermenninir hjá Eystursamgonguni tóku tær seinastu holurnar sunnudagin.

Beint eftir boðaði ovastin hjá Eystursamgonguni frá, at kríggið í Afghanistan er liðugt, tí nú vóru teir seinastu menninir hjá Al-Qaeda niðurbardir. Í seinasta álopinum doyðu umleið 200 menn hjá Al-Qaeda, meðan einir 25 vórðu tiknir fangar.

Bæði Eystursamgongan og USA halda, at einir 2000 mans hjá Al-Qaeda eru slopnir til rýmingar úr Tora Bora, og at teir eru á veg til pakistanska markið. Pakistan hevur styrkt vaktarhaldið á markinum munandi, og fleiri túsund hermenn hava fingið boð um at steðga monnunum hjá Al-Qaeda, koma teir tann vegin.

Bæði Colin Powell, uttanríkisráðharri og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri noyddust sunnudagin at viðganga, at amerikanarar vita ikki, hvar Osama bin Laden er. Men báðir løgdu dent á, at bardagin er ikki av, fyrr enn bin Laden er funnin. Tað sama er galdandi fyri Taliban-leiðaran, Mohammed Omar.

Hvar eru teir?

Spurningurin er so, hvar bin Laden og Omar eru. Tað er avmarkað, hvar teir kunnu fjala seg. Eygleiðarar siga, at eru teir framvegis í Afghanistan, kunnu teir ivaleyst fjala seg rættiliga leingi í fjøllunum.

Er tað so, at bin Laden longu er í Pakistan, kann hann fjala seg hjá ættarbólkunum har norðuri í landinum, men tað verður ikki hildið, at hann kann fjala seg leingi har.

Eru bin Laden og Omar hvørki í Afghanistan ella Pakistan, eru helst tríggir møguleikar eftir. Teir kunnu vera í Jemen, men har er trupult at fjala seg. Ein annar møguleiki er Somalia, men somalisku myndugleikarnir hava sagt, at amerikanarar eru vælkomnir hagar at leita, so har eru teir neyvan. Triði møguleikin er Kekenia. Nógvir kekenar hava stuðlað bin Laden, eins og nógvir kekenskir hermenn hava verið í Al-Qaeda. Tað er eisini alment kent, at bin Laden hevur havt venjingarlegur í Kekenia.

Funnið ætlan um álop í London

Eitt portugisiskt blað skrivar, at Al-Qaeda hevði lagt ætlan um bumbuálop í bretska høvuðsstaðnum.

ÚTLAND
Fartekst

Blaðið hevur upplýsingarnar úr einari lummabók, sum ein av tíðindamonnum blaðsins fann í einum húsum í afghanska býnum Kandahar. Húsini vórðu frammanundan nýtt sum venjingarstað hjá yvirgangsfelagsskapinum Al-Qaeda.

Expresso skrivar, at í bókini verður greitt frá einari ætlan um at spreingja eina 480 kilo tunga fjarstýrda bumbu í Moorgate-umráðnum í London.

Í lummabókini, sum er 82 síður, verður greitt gjølla frá ætlanini, men ongastaðni verður sagt nakað um, nær álopið skuldi ella skal setast í verk. Tað stendur heldur einki um, nær lummabókin er skrivað, og tí heldur Expresso, at talan kann vera um eina læru-bók hjá Al-Qaeda.

Teksturin um tað ætlaðu bumbuspreingingina í London er á enskum, men millum reglurnar eru fleiri viðmerkingar, sum eru á arabiskum. Hondskriftin er tann sama, og tí er tað helst sami maður, sum hevur skrivað bæði tekst og viðmerkingar.

Í lummabókini eru nágreiniligar upplýsingar um, hvussu tey 480 kiloini av spreingievni skulu býtast sundur í tólv kassar, hvussu nógvar løðingarnar skulu vera, hvussu bumban skal gerast, og hvussu hon skal spreingjast við fjarstýring

Færri fólk flyta úr Føroyum

FLYTING
Ingrid Bjarnastein

Í árbókini fyri Føroyar 2001 síggja vit, at í 1995 fluttu 2272 føroyingar úr Føroyum. Síðani tá hevur talið verið støðugt lækkandi og í fjør var talið komið niður á 1345 fluttar føroyingar.

Størsti parturin av teimum, sum fluttu úr Føroyum í fjør, fluttu til Danmarkar. Av teimum 1345 rýmdu føroyingunum, leitaðu 1083 sær til Danmarkar. Næst á listanum var Ísland og síðani Noreg og Bretland. Bert ein føroyingur er fluttur til Afrika í fjør.

Tað sæst týðiliga, at tey, sum eru flutt úr Føroyum helst eru farin av landinum í lestrarørindum. Nógv tann størsti parturin av fráflytarum er í aldursbólkinum frá 15 – 29 ár.

Í árbókini sæst annars eisini, at tað flyta fleiri fólk til Føroya enn úr Føroyum. Í fjør fluttu 1808 fólk til Føroya, harav vóru 906 mannfólk og 902 konufólk. Tað eru fólk í 20´unum og 30´unum, sum leita sær til klettarnar. 768 føroyingar í aldrinum 20 – 34 ár fluttu til Føroya í fjør, og er hetta væl meira enn ein triðingur av øllum teimum, sum eru flutt til Føroya í fjør.